## Bygdarrá›i› í Leirvík skipa›

KOMMUNUVALI‹

Leirvíkar Bygdarrá› hevur á fundi mánadagin 11. desember skipa› seg solei›is: Sjúr›ur Eliasen, borgarstjóri, Tórhild Bjarkhamar, varaborgarstjóri.

Í fíggjarnevndini sita: Sjúr›ur Eliasen, forma›ur, Poul Andrias Joensen og Gu›ri› Lava Olsen.

Í teknisku nevnd sita: Poul Andrias Joensen, forma›ur, Joen Magnus Rasmussen og Tummas Justinussen.

Í trivna›arnevndini sita: Tórhild Bjarkhamar, forma›ur, Gu›ri› Lava Olsen og Randi í Jógvanstovu.

VI‹MERKING

# Nú er nóg miki›!!!

**Hanna Lisberg**
*Tórshavn 30.11.00*



Teir hava sjálvir brúk fyri at savna kreftir – her hugsi eg um at fáa hervaldi› av landinum, sum teir hava kravt uppundir hvørt einasta val. Nei, landsst‡ri› eigur at venda sær til Føroya fólk vi› einum grei›um spurningi:
c ja
c nei

so einfalt eigur ta› at ver›a gjørt.

Í gjár hoyrdi eg á Rás 2 eina rø›u, sum landsst‡risma›urin Thorbjørn Jacobsen hevur hildi› í Íslandi – og eftir øllum at døma hevur íslendingum dámt væl hesa rø›u, tí hon var› send fleiri fer›ir upp í saman.

Ta›, sum undrar meg mest er: Hví kemur landsst‡ri› ikki straks og spyr okkum føroyingar!! Eg fari ikki at atkvø›a fyri loysing, um so 1000 tals íslendingar bó›u meg hjálpa Høgna Hoydal at slíta!

Torbjørn J. hakka›i øgiligt í tí, tá hann tók í aftur: moralska hjálp um ikki anna›.

Eg skilji ikki, at íslendingar vilja blanda seg uppí. Alt, sum samgongan hevur rá›st um, er miseydna›, men pengar hevur hon søpla› burtur í stórum tali, serliga tá hugsa› ver›ur um tali› av fólki, sum hevur veri› vi› til hesar »útfer›ir« til Kristiansborg!

Annars tykir mær, at landi› ver›ur st‡rt av juristum, summir gott og væl lidnir at læra og tessvegna ongar lívsroyndir hava.

Ta› sær út sum færri og færri avger›ir ver›a tiknar av politikarunum. – Máli› skal í eina n‡ggja nevnd – nei helst kannast av kanningarstjóra – um eingin juristur í landsst‡rinum megnar hetta, ja, so fara vit út um og finna ein (ta› hevur minni at siga, um hann kostar hálva ella heila millión) samanber vi›v. Signar á Brúnni, ella tá landsst‡rismálanevndin handa›i løgmanni eina ni›urstø›u, sum løgma›ur einki gjørdi vi›, men vildi hava 400.000 at gjalda kanningarstjóra. Eru juristarnir í Tinganesi ikki nóg gó›ir, tá løgma›ur vildi hava ein uttan í frá?

– – –

Vit vanlig fólk duga at síggja, at alt í samfelagnum er ni›ursliti›, me›an so gott sum bara loysingarmáli› ver›ur vi›gjørt – uttan úrslit. Sjúkrahús og starvsfólk eru ni›urslitin – vegir – skip – fiskiskip og fer›askip – skúlar og mangt anna› er ni›ursliti›.

Nær og hvussu vit fáa loyst hesar trupulleikar er ein stórur spurningur.

Vit eru nú í somu stø›u sum í 1948 vi›v. heimast‡rislógini, sum samgongan hevur sligi› seg til tols vi›.

Á denn skomm!

Enn havi eg ikki hoyrt naka› um, hvussu loysingin skal gjaldast! Í gjár var› sagt í tinginum vi›v. vegager› ávikavist í Kollafir›i og Tjørnuvík vit hava ongar pengar til ta›, sum krevst!!! Gud ná›i okkum, um vit fingu loysing vi› hesum landsst‡rinum!

Eg heiti á andstø›una í skrivt og talu at siga fólki frá, hvussu nógv av ø›rum málum liggja á láni, tí samgongan »spælir loysing«.

Gud signi Føroyar!

# Uppaftur ríkari mál

**Herfyri kom út Føroyska samheitaor›abókin eftir Henning Thomsen, sum eg persónliga havi bí›a› eftir í fleiri ár. Stutt er at siga um hetta verk, at ta› er eitt megnar verk í allar mátar**



UMMÆLI
*Ólavur í Beiti, rithøvundur*

Ta› frøddi meg almiki›, tá i› eg hoyrdi at umsí›ir er samheitaor›abókin hjá Henningi Thomsen komin út. Havi fylgt vi›, tá i› okkurt hevur veri› at hoyrt í fjølmi›lunum um arbei›i› vi› verkinum seinnu árini, og hvussu torført Henning Thomsen hevur havt ta› undir arbei›inum vi› verkinum. So kunnu vit bert fegnast um, at verki› hóast alt hevur dygdina og stendur øll síni mát og eisini tey mát, vit seta til slíkt verk.

Havi siti› og kaga› leysliga gjøgnum Føroysku samheitaor›abókina og eg fari at siga, at hetta hevur bert veri› í nakrar fáar dagar, tí ta› er stutt sí›an heitt var› á meg at geva verkinum nøkur or› nú eftir útkomu. Sum skrivandi ma›ur fari eg siga, at ta› er ein d‡rgrip vit nú hava fingi› aftrat og ivist eg onga løtu í, at ta› ver›ur hollur stu›ul hjá øllum sum skriva og sum ynskja at brúka eitt fjølbroytt mál. Ta› ver›ur eisini almiki› lættari at fáa atgongd til málgoymsluna vi› hesi bók.

Í formælinum til samheitaor›abókina, skrivar Henning Thomsen, at hann fór undir hetta megnar verk fyri tíggju árum sí›ani. »Arbeitt var› vi› penni og pappíri, og ætlanin var ikki, at hetta skuldi gerast slíkt stórt og drúgt verk.«

Mongum brestur ætlan, kunnu vit nú siga vi› or›atakinum, og bert fegnast vi› Henningi Thomsen og eisini forlagnum »Sti›in«, at verki› er komi› út og í so snotiligum búna og stødd.

Eitt ta› mest umrá›andi vi› eini or›abók er - uttan mun til hvat slag talan er um - at hon er væl innbundin og tolir at ver›a brúkt og handfarin í skundi eisini, og eg haldi at henda bókin sær út at tola eitt sindur av hvørjum. Hon er væl innbundin og liggur frábera væl í hondunum eisini, og vi›víkjandi sjálvum tekstinum er at siga, at hann hevur gó›a stødd og er grei›ur á allan hátt.

Sum eg havi siti› vi› samheitaor›abókini nú í einar tríggjar dagar og hugt gjøgnum hana, so havi eg als ikki hugt eftir skeivleikum og stavivillum og ø›rum smáligheitum, men bert fegnast um, hvussu gott hetta verk er at hava fingi› til ognar nú, tó at eg hev›i eisini havt stóra gle›i av tí, um ta› var komi› eini 5-6 ár fyrr.

Eg ivist onga løtu í, at eg hev›i havt n‡tt eitt meiri ríkt og fjølbroytt mál, um samheitaor›abókin hev›i veri› tøk fyrr. Men lat ta› so fara, tí nú hava vit skrivandi og øll á bæ›i skúlum, læristovnum, virkjum, fjølmi›lum, heima vi› hús so møguleikan at ríka um okkara mál á bæ›i ein og annan hátt.




*Henning Thomsen vi› n‡ggju Føroysk samheitaor›abókini, sum hann hevur lagt til rættis*

Á permuni stendur, at í bókini eru ikki minni enn 50.500 leitor›, sum aftur eru skipa› í 2.700 bólkar hvør vi› sínum leitor›i fyrst í bólkinum. Har aftrat eru undirbólkar vi› or›um, sum eru nær skyld vi› leitor›i›, og so eru dømi, tiltøk og or›afelli úr føroyska málinum, so her er so at siga alt í einum verki.

Føroyska samheitaor›abókin hjá Henning Thomsen er eitt einastandandi verk og eg fái ikki lati› vera vi› at rá›a øllum bæ›i ungum sum eldri - leikum og lærdum - at ogna sær hetta megnar verk. Okkara mál ver›ur ríkari og okkara samleiki sterkari.

Henning Thomsen hevur ogna› samheitaor›abókina til konuna Elin Thomsen, men hon er sanniliga eisini ogn hjá okkum øllum, hjá føroyska fólkinum.



## TIT SPYRJA VIT SVARA


*Bergur Hansen, djóralækni*


*Heri Joensen, prestur*


*Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur*


*Ingi Højgaard, løgfrø›ingur*


*Jens Andreassen, lækni*


*Jóhanna á Tjaldrafløtti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur*


*Jón Klein Olsen, politistur*


*Jón Kragesteen. Fer›slutrygd*


*Julianna Næs, pedagogur*


*Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi*


*Turid Thomsen, lestrarvegglei›ari*


*Marius Staksberg, málfrø›ingur*

### Læknin

Hú›in flosnar av tumlinum. Ta› ger, at eg eri sera eymur. Ta› koma djúp sár á tumlarnar vi› jøvnum millumbilum av ongum. Havi veri› hjá lækna, sum heldur, at ta› fer burtur av sær sjálvum. Men nú eru nógvir mána›ir farnir, og skili› er ta› sama. Hú›in er ikki vanlig á tumlinum - men hvøss, sum ein skorpa og so knappliga koma sárini aftur. Hvat kann eg gera vi› henda trupulleika? Og hvør kann orsøkin vera?

*Fyrst eitt sindur um orsøkina. Hetta kann vera allergi, men meiri sannlíkt er ta› ein irritatión - antin mekanisk ella toksisk. Uttan mun til, hvat av hesum talan er um, hevur ta› stóran t‡dning, at tú hugsar teg væl um og finnur út av, um tú tey seinnu árini ert komin í samband vi› okkurt n‡tt evni og/ella ert farin at takast vi› anna› arbei›i – her hugsi eg eisini um frítí›ararbei›i. Eru ta› bert tumlarnir – eru ikki eisini fremstifingrarnir involvera›ir? Hvussu síggja neglirnar út? Rullar tú cigarettir? Ta› kundi veri› cigarettpappíri›, tú ikki tolir. Arbei›ir tú meiri vi› vatni nú enn á›ur? Er eksem a›rasta›ni á likamshú›ini?*

*Ein fullfíggja› sjúkrasøga er so umrá›andi og lei›ir teg nógv skjótari og lættari til eina møguliga orsøk. Ta› kann vera regulert allergiskt kroniskt kontakteksem, og her er nikkelallergi eitt hitt best kenda dømi›.*

*Tá hú›in ikki tolir eitt ávíst evni og reagerar móti hesum vi› at gerast tjúkk og møguliga merkt av eksemi, ver›ur ta› kalla› toksiskt eksem. At enda kann hetta eisini vera psoriasis, antin tú hevur psoriasis a›rasta›ni ella ikki. Nakrir fáir psoriasissjúklingar kunnu nevniliga hava slík sjúkuey›kenni sum einastu manifestatión uppá psoriasis.*

*Ta› hevur t‡dning at finna fram til orsøkina, tí vi›ger›in ver›ur tilrættaløgd eftir, hvør hendan er. Umframt at eliminera orsøkina, um hetta letur seg gera, skal hú›in møguliga eisini vi›gerast vi› sterkum steroidsalvum ella tjørusalvum og í summum førum eisini vi› ávísum strálum.*

*Eg haldi, tú hev›i fingi› gagn av at tosa vi› ein hú›alækna, hóast trupulleikin í fyrstu syftu ikki virkar at vera so stórur, men eg kann ímynda mær, hvussu invaliderandi ta› er ikki at hava tumlarnar frískar.*

### Løgfrø›ingurin

Eg havi í ár móttiki› tvær “lurtarakanningar” frá Útvarpi Føroya, har tey gera vart vi›, at eg eri fluttur úr Danmark, og ikki havi tekna› meg fyri einum lurtarahaldi. Eitt, sum eg undrist á vi› hesi kanning er, at eg havi fingi› eitt ra›nr., og havi frá ø›rum fingi› at vita, at solei›is er eisini hjá teimum, sum hava fingi› hesa áheitan. Hesi tøl eru ikki eins, tvs. at vit eru øll skrásett vi› ymiskum nr. hjá ÚF. Hevur ÚF loyvi at skráseta fólk vi› ra›nr. , tá talan einans er um eina kanning og ikki um kundar.

Sí›ani eg flutti til Føroya, havi eg bú› á einum kamari í Havn. Vegna plásstrot havi eg ikki fingi› mær sjónvarp/útvarp, men havi eitt videokort í telduni, solei›is at eg síggi sjónvarp og hoyri útvarpi›. Í Danmark hevur ikki veri› skyldugt at goldi› “licens” av hesum, men skuldi hetta ætlandi broytast. Hvussu er í Føroyum hesum vi›víkjandi?

*Vi›víkjandi spurninginum um lurtarakanningar, so gangi eg í svarinum út frá, at Útvarp Føroya hevur heimild til at fáa uppl‡singar um tygara navn og bústa›. Eg gangi eisini út frá, at Útvarp Føroya gevur tygum eitt ra›nr. fyri lættari at kunna umsita lurtarakanningina.*

*Tá ra›nr. ver›ur n‡tt til at gera lurtarakanningina lættari at umsita, vil eg meta, at Útvarp Føroya hevur loyvi til hetta. Vi›víkjandi spurninginum um videokort í telduni, so hevur hetta vi› sær, at tygum síggja sjónvarp og hoyra útvarp. Sambært lógini skal vanliga gjaldast fyri sjónvarps– og útvarpsmóttakarar. Tá videokorti› ger, at tygum kunnu n‡ta telduna sum sjónvarp og útvarp, so hava tygum eitt tól, sum kann brúkast sum sjónvarps- og útvarpsmóttakari. Tí meti eg, at tygum hava skyldu at rinda sjónvarps- og útvarpsgjald.*

### Sálarfrø›ingurin

*Spurnarkassin hevur fingi› bræv frá fólki, i› er dulnevnt. Vanliga ver›ur ikki svara› brøvum uttan avsendara, men spurnarkassin hevur í hesum føri valt at víkja frá regluni. Spurningurin, i› er komin, sn‡r seg um kvinnu, sum er misn‡tt seksuelt sum barn og ung, og sum nú, sum vaksin, er farin at hugsa um ta› hon hevur veri› út fyri, og hvat ta› hevur gjørt vi› hana og lív hennara. Kvinnan, i› skrivar, bi›ur um ikki at vera endurgivin, men at fáa gó› rá›. Hesum ynski játta vit. Fyri at kunna geva rá›, er ney›ugt at taka samanum ta›, brævskrivarin sigur.*

*Ta›, i› hon nevnur, er serliga skommin, skuldarkenslan og vammilsi› vi› seg sjálva, sum ta› i› situr eftir, aftaná ágangin í barna- og ungdómsárunum. Hon vísur eisini í brævinum á, at hennara máti at skapa samband og samveru vi› onnur, serliga menn, er vor›in seksualisera›ur, ella vi› ø›rum or›um, at hon er “løtt” at koma í song vi› – hóast ta› ikki er ta›, hon vil.*

*Ta› fyrsta eg vil siga er, at ta› er rætt og gott, at tú hevur tiki› avger› um, ikki at vera einsamøll um ágangin og nir›ingina, tú hevur veri› úti fyri. Sum tú sjálv sigur, so loysir ta›, at koma fram vi› tingunum, í sjálvum sær ongan trupulleika, kanska ger ta› tilveruna uppaftur meiri trupla, tí tú ikki fært fjalt teg. Men út frá tí tú sigur, so hevur tú gó›an stu›ul í heiminum. Men skal eg taka teg uppá or›i›, so haldi eg, at tú hevur sakkøna hjálp fyri ney›uni, hvørki ma›ur, børn ella vinfólk kunnu geva tær ta›, tú hevur fyri ney›uni. Grundin til, at eg sigi so er, at ta› er ringt at gjøgnumsko›a paradoksi›, sum er: ta› er tú, i› er svikin av teimum vaksnu sum barn, og samstundis er ta› tú, i› hevur skuldar og skommkensluna – ikki tann i› óger›ina hevur framt. Ta› er ta›, i› fólk vanliga kalla: “hon hevur sjálv veri› úti um ta›, kundi bara lati› vera vi› at vera so flirtandi”. Ta› kann passa, tá talan er um vaksin oman fyri 18 ár, men aldrin børn. Ongantí›. Møguleikarnir tú hevur, er at venda tær til kommunulækna ella psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum. Nakrir sálarfrø›ingar hava privatan praksis: Anna Debes Hentze og Jegvan Bæk.*

*Eg havi hug at leggja naka› afturat hesum svari. Ta› sum er so óhugnaligt, tá talan er um ágang móti børnum, ikki bert seksuellum, men eisini annan ágang sosum buking, tøgn ella ey›mjúkan, er ta› trúsemi, i› børnini vísa. Og grundin til at so er, er einføld. Børnini hava brúk fyri vaksnum, ta› eru vit vaksnu sum skulu taka okkum av og tryggja framtí›ina hjá børnunum, og fortreytin fyri tí er álit. Grundleggjandi álit er fortreyt fyri lívi og menning. Og vit eru solei›is innrætta›i, at vit heldur oy›a okkum sjálvi, fornokta kenslur, tankar og handlingar, enn at risikera at missa vi›urkenningina og sambandi› vi› okkara nærmastu. Ta› er m.a. tí, at tílíkt sum seksuellur ágangur framdur av einum av teimum nærmastu er so oy›ileggjandi: áliti› ver›ur til svik, og tann sum er svikin tekur ábyrgdina.*

*Ikki minst av hesi grund er ta› umrá›andi, at vit í Føroyum alment siga frá, at vit ikki gó›taka, at børn ver›a buka›i ella útsett fyri ø›rum ágangi í heimunum. Vóni og vænti, at Løgtingi› tekur avger› um, at børn heldur ikki mugu revsast heima. Í skúlunum er ta› sum kunnugt banna› vi› lóg.*

### Fø›slu- og húsarhaldsfrø›ingurin

Eg havi roynt at klænka meg óteljandi fer›ir, bæ›i vi› at fara á ein serligan klænkikur og at eta minni. Einki hjálpir. Ta› einasta, sum sær út til at muna er at eta vanligan mat og minka um nøgdirnar. Mær dámar allan mat. Hvør matur, tvs. vanligur matur er gó›ur at eta, sum ikki fitar, men mettar væl. Hvørjum skal eg halda meg burtur frá?

*Royndir vísa, at klænkikurar og minni matmongd ikki er nøkur gongd lei›, um tú ætlar tær at sleppa av vi› nøkur kilo. Klænkikurar virka vanliga á tann hátt, at tú tapir nógv kilo uppá stutta tí›, men trupulleikin er bert tann, at tey mistu kiloini ikki eru feitt, sum jú er ta› ynskiliga, men harafturímóti væta og vøddamongd. Ta› førir vi› sær, at evnisskifti› (stofskifti›) lækkar, tvs. at nú noy›ist tú at eta minni enn á›ur fyri ikki at taka uppá. Ta› mest vanliga er, at tá klænkikururin er av, ja so ver›ur eti› just á sama hátt sum á›ur, og eftir stuttari tí› eru øll kiloini komin uppá aftur og nøkur afturat. Um tú ætlar at tapa teg, so er ta› bert tú, sum kanst gera naka› vi› tína stø›u. Skal ta› eydnast er umrá›andi at broyta matvanarnar solei›is, at hesir kunnu vi›føra eitt vekttap, sum kann vera varandi. Ta› er ikki altí› tær stóru broytingarnar, sum skulu til fyri at ta› skal eydnast. Umrá›andi er, at tú etur til allar máltí›ir, tvs morgunmat, døgur›a, náttur›a og so 2-3 millummáltí›ir. Máltí›irnar skulu ikki ver›a so stórar. Til morgunmat vil eg mæla til tjúkka flís av rugbrey›i uttan margarin vi› soltnum vi›skera, ella havragreyt og so eitt stk. frukt. Um tú vanliga etur fransbrey› ella rundstykkir til morgunmat so goym hetta til sunnumorgun. Til døgur›a fleiri eplir á tallerkin og grønmeti. Ta› besta grønmeti› er gularøtur, kál, røtur, broccoli, leykur og anna› grovt grønmeti. Hetta mettar væl og inniheldur onki feitt. Ta› er ikki ney›ugt vi› so stórum mongdum av fiski og kjøti. Annars er allur vanligur matur gó›ur, tú skal bert minnast til at skera alt ta› sjónliga feitti› burtur, og n‡ta minst møguligt av smelti, best er um tú heilt kanst lata vera. Kóka heldur døgur›amatin enn at steikja, so sparir tú eisini feitt, ella koyr rættin inn í ovnin. Javna sósina í sta›in fyri at baka upp, men minst til at taka alt feitt omanav sk‡ini og ger sósina tunna. Til náttur›a tjúkkar flísar av rugbrey›i vi› soltnum vi›skera. Sáltin vi›skeri er vi›skeri, sum inniheldur minni enn 10 gr. av feitti pr. 100 g. av vøruni. Til millummáltí›irnar frukt ella okkurt grønmeti. Ta› er umrá›andi at drekka nógv vatn 1-2 ltr um dagin. Et minst møguligt av kakum og søtmeti. Til seinast vil eg mæla til eitt sindur av motión. Ger ta› i› fellur tær lættast. Brúka umlei› 4 tímar um vikuna. Gó›a eydnu.*

### LØGREGLAN

Hvat ger løgreglan fyri at ste›ga rúsevnissølu í Føroyum?

*Løgreglan í Føroyum hevur eina narkodeild, sum millum anna› arbei›ir vi› at fyribyrgja brotsverkum innan rúsevnissølu. Narkodeildin hevur tveir fastar politistar.*

**Spurnarkassin**
**- tit spyrja vit svara**

**Hvønn mikudag**

**í Sosialinum**

**Spurningar kunnu**

**senda til:**

**Sosialin**

**postsmogu 76**

**110 Tórshavn**

**fax. 314720**

**ella teldupost: spyr@sosialurin.fo**

Minnist til at merkja, hvørjum tit seta spurningin.